Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Minningarorð um systkinabørnini bæði

## Súna á Ryggi, f.1. mai 1948 - d. 2. mars 2009, og Albert Hansen, f. 20. sept. 1943 - d. 5. apríl 2009

**Góði Súni**

2. mars í fjør var fjørðurin so rógvin. Títt lívsskeið var at enda komið. At vera saman við tær kendist altíð gott. Tú vart altíð til staðar við einari stillari nærveru, eygleiddi og lurtaði, tó hevði tú tína greiðu meining og segði tína hugsan um samfelagsviðurskifti, politikk o.a. serliga umstøðurnar hjá fiskimanninum høvdu tín áhuga.

At vera førur fyri at bera álvarsliga sjúku og framvegis megna at gleðast um lívið og smáar hendingar í gerandisdegnum var onki minni enn eitt bragd. Tú átti ein frið og innari styrki, sum er gott at eiga, tá lívsins stormar leika í.

Henda frið og nøgdsemi havi eg kent, frá tí eg kom inn í tykkara familju, har vermóðir Arna altíð skapti hugna í heiminum, altíð við tí góða orðinum og væl nøgd. Jógvan,verfaðir eydnaðist mær tíanverri ikki at læra at kenna, hann andaðist í 1965, bert 57 ára gamal. Ingibjørg, fastir tykkara, sum kom at hava so nógv at týða fyri tykkum systkini, hevði somu lívsáskoðan sum foreldur tykkara. So tit hava fingið góðan førning við tykkum út í lívið, og hetta merkist.

Aftaná lokið realskúlaprógv fórt tú til skips í nøkur ár. Síðani á skiparaskúla. Síðani aftur til skips. Tú hevur ført skip og havt tín egna útróðrarbát í fleiri ár. Seinastu árini starvaðist tú hjá Miðvágs Kommunu. Væl lýddur av øllum. Hevði seyð og gæs í fleiri ár . Tær dámdi so væl at fáast við kriatúr og at koma norður á trøðna ta tíðina, seyðurin gekk har. Tú gekk eisini á fjall á Heimanhús í nógv ár, mangan vakran og eisini baldrutan túr hevur tú havt har norðuri. Visti millum annað væl skil á fugli, hvar hann átti o.a. góðir túrar saman við tær á Fjallavatni, seinast á sumri 2007. Tú hevði tína dagligu gongd í



*Súni*

heiminum hjá Bergittu og Georg og høvdu tit nógvar góðar løtur saman.

Tú hevði umsorgan fyri tínum næstu heilt til tað seinasta. Góði Súni, nú er ongin at ringja til at spyrja um floglíkindi o.a..Var ein í iva um slíkt var bara at ringja til tín. Vaksin upp úti á bygd og búleikast har alt lívið og verið við í øllum arbeiði, ið har var og sum sjómaður, hevði tú gott skil á øllum, sum fyrifórst í náttúruni. Góði Súni. Tú vart ikki ein maður, ið kravdi so nógv av lívinum hvat tí matriella víðvíkti, tú sást onnur virðir, men altíð væl nøgdur og gleddist um lívið og tá tað gekst tínum næstu og kenningum væl. Ein góð gáva at eiga. Tú hevur víst okkum, ið eftir sita, eitt gott dømi um hvussu lívið kann livast í nøgdsemi og tøkk til tann ið øllum ræður.

Góði Súni, vit sakna teg. Hvíl í friði.

**Marita**

**Góði Albert**

Góðan mánað aftaná at Súni andaðist vóru eisini boð eftir tær. Ja, orðini: Ongin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldið gistir kunnu av sonnum sigast um teg hendan leygardagin 4. apíl í fjør, tá tú komst aftur í Vágoynna aftaná at hava vitjað systirdóttir tína við húski í Kollafirði. Norðast í bygdini komin til Sandavágs vart tú úti fyri ferðsluvanlukku. Bleiv fluttur á Landssjúkrahúsið, men andaðist tímar seinni, 5. apríl.



*Albert*

Kom at kenna teg í 1973. Stillførur, gjørdi onki hovasták burtur úr sær sjálvum. Gleddist tá tað gekst tínum næstu og kenningum væl.

Albert var heimamaður. Arbeiddi saman við faðir sínum, tí kenda bátasmiðinum Hans Kristoffuri Hansen, við at smíða bátar. Har kom nógv fólk á gátt í bátasmiðjuni. Helst hevur mong støða um samfelagsviðurskifti úti og heima verið havd á lofti har. Eisini komu nógv fólk í heimið hjá tykkum, har Lina , móðir Albert tók væl ímóti. Sera hugnaligt at koma á gátt hjá tykkum.

Í 1975 doyði Johan, yngri bróður Albert av vanlukku, bert 30 ára gamal og hevur hetta verið ein dyggur smeitur fyri foreldrini og systkin. Tú komst nógv í heimið hjá Marionnu og Erlingi, og hevur tað verið hugaligt, tá ein annars er einsamallur í húsi.

Albert fekst eisini við at hava seyð inntil fyri nøkrum árum síðani. Kom onkuntíð á gátt í heimi okkara og kunnu vit bara bera tær alt tað besta . Góða Mary og tit uppi hjá Jyttu. Saknurin er størstur hjá tykkum, men ein er, ið leiðir fram á veg.

Hvíl í friði, góði Albert.

**Marita**

---

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður, at elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Kristianna Johannesen**
Ættað frá Gjógv

Búsitandi í Tórshavn andaðist hósdagin 06.05.2010 72 ára gomul

Kistan fer úr landsjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 13.

***Familjunnar vegna***
***Vagn, Asbjørn, Sólrun, Maritt og Suni***

---

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra mamma, omma og vermamma okkara

**Tóra Spangenfeldt,**
fødd Skála,

andaðist í heiminum 4. mai 89 ára gomul.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mánadagin 10. mai kl. 18.00 og jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 11. mai kl. 14.00.

***Vegna tey avvarðandi***

***Finn Spangenfeldt***

---

## TØKK

Eg vil fegin við hesum hjartaliga takka øllum, sum á einhvønn hátt góvu mær ans á 80 ára føðingardegnum 30. apríl 2010.

Takk fyri vitjanir, uppringingar, gávur, brøv, kort, blómur og heilsanir annars.

Tøkk til tykkum øll, sum komu til hátíðarhaldið og vóru við til at gera dagin hugnaligan og minnisríkan.

Tøkk til stýrið fyri Meinigheitshúsinum á Skála fyri vælvild og loyvi til at brúka húsið til hátíðarhaldið. Tøkk til tykkum, sum stílaðu so væl fyri veitsluni. Takk til vinir, kenningar, bygdarfólk og felagsskapir, sum øll á ymiskan hátt hava verið við til at geva lívinum innihald og gleði. Ein innilig tøkk til alla familjuna fyri gott samanhald og trúfesti. Gleðin og takksemið eru stór til okkara samfelag, sum gevur okkum so nógvar og ríkar møguleikar gjøgnum lívsskeiðið. Til síðst, men ikki minst:
Tøkk fái Gud fyri lívið.

***Bestu heilsanir***

***Sigvald Kristiansen***